# Broyting av byggisamtyktini fyri Tvøroyrar Kommunu – juni 2014

## Broyting í ásetingunum:

- Økið “D: Havnarøki” broytir navn til “D1: Havnarøki.”
- Eitt nýtt slag av havnarøki verður upprættað við navninum “D2: Havnarøki”.

**Øki D1: Havnarøki**
1) Økið verður lagt av til havnaendamál (herundir eisini bátahavnir) og virkir, sum hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey.

2) Byggistigið fyri D1 havnarøkið sum heild má ikki fara upp um 0,3.

3) Rúmmálið á húsinum má ikki, uttan serloyvi frá býráðnum, fara upp um 3 $m^3$ fyri hvønn $m^2$ av samlaða økinum, ið er lagt út sum D1 havnarøki.

4) Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins.

5) Bygt má ikki vera nærri bryggjutrom enn 10 m ella nærri aðrari bygging enn 5 m.

6) Neystabygging verður ikki loyvd á hesum økinum, og loyvt verður ikki, at verandi neyst verða útbygd. Um eitt neyst verður tikið niður, verður ikki givið loyvið til at byggja uppaftur.

7) Býráðið hevur heimild til at gera, ella at geva loyvi til, útfyllingar út á sjógv innanfyri tað økið, sum er lagt út til havnarøki á plankortinum.

**Øki D2: Havnarøki**

1) Økið verður lagt av til havnaendamál og virkir, sum hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey.

2) Byggistigið fyri D2 havnarøkið sum heild má ikki fara upp um 0,5.

3) Rúmmálið á húsinum má ikki, uttan serloyvi frá býráðnum, fara upp um 6 $m^3$ fyri hvønn $m^2$ av samlaða økinum, ið er lagt út sum D2 havnarøki.

4) Mest loyvda hædd á bygningum er 20 m. Tá serligar orsøkir tala fyri tí, kunnu silobygningar, goymslutangar og bygningar til serstaka maskinútgerð verða hægri enn 20 m.

5) Bygt má ikki vera nærri bryggjutrom enn 10 m ella nærri aðrari bygging enn 5 m. Bygt má ikki vera nærri kirkjugørðum enn 15 m.

6) Neystabygging verður ikki loyvd á hesum økinum, og loyvt verður ikki, at verandi neyst verða útbygd. Um eitt neyst verður tikið niður, verður ikki givið loyvið til at byggja uppaftur.

7) Býráðið hevur heimild til at gera, ella at geva loyvi til, útfyllingar út á sjógv innanfyri tað økið, sum er lagt út til havnarøki á plankortinum.

Viðgjørt í Havnarnevndini og Teknisku Nevnd, 11. juni 2014

Einmælt samtykt í Tvøroyrar Býráð, 11. juni 2014